



## VEÐRIÐ




**Veðrið í morgin:**
Vaksandi vindur til andøvsgul upp í ein strúk av norðuri, seinni av landnyrðingi. Mest skíggjað og kavaæl, men til tíðir kann tað klárna eitt sindur. Hitin um frostmarkið.




**Veðrið nýggjársaftan:**
Andøvsgul upp í ein strúk av norðuri og landnyrðingi, eitt skifti upp í hvassan vind. Um kvøldið makar hann vindin, til gul til stívt andøvsgul. Skiftandi skýloft við kava- ella vátakavaælum. Hitin um 2 kuldastig.




**Veðrið nýggjársdag:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av norðuri og landnyrðingi. Skiftandi skýloft við regni ella vátakavaælum. Hitin um 3 stig.

**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk, seinni lot til andøvsgul av landnyrðingi og norðuri. Mest skýggjað men toluliga turt og hitin um 3 stig.

**Veðrið sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av norðuri og útnyrðingi. Mest skíggjað, men toluliga turt, og hitin um 2 stig.

# Brandur bjóðar til útgávukonsert

**Í samband við, at nýggja fløgan hjá Brandi Enni »Sometimes Truth Needs a Lie« verður útgivin, verður skipað fyri útgávukonsert kring landið.**



KONSERT
*Barbara Holm*
*barbara@ras2.fo*

Brandur vann heiðurin sum ársins sangari á Planet Awards sunnukvøldið 27. des 2009.

Átta ár eru liðin síðani Brandur, sum 12 ára gamal, hevði sína fyrstu útgávukonsert í Norðurlandahúsinum.

Nú er hann klárur við eini nýggjari útgávu, sum leingi hevur verið ávegis. Brandur hevur skrivað løg til hesa útgávu, seinastu fimm ársini, síðani hann byrjaði samstarvi við tónleikaforlagið Air Chrysalis of Scandinavia. Hann hevur skrivað sangir saman við nøkrum av heimsins fremstu sangskrivarum, sum hava skrivað løg til millum onnur Joe Cocker, Celine Dion, Gavin DeGraw, Mr. Big, Scorpions, Westlife, AC/DC, Black Sabbath, Tim Christensen og so framvegis.

Fløgan var innspæld og miksað í august og september mánaði í ár, í Aerosol Grey Machine Studios, har Roxette nú eru í ferð við at innspæla sína næstu fløgu. Tað sum er serligt við hesum upptøkuhølinum er, at møguleiki er fyri at innspæla og miksa við eldri, analogari útgerð, sum hevur givið upptøkunum eitt serliga heitt og livandi ljóð. Lionheart International og Universal Music útgeva fløguna.

Brandur bjóðar til eina fjølbroytta konsert vid einum væl mannaðum bólki við strúkarum, har nakrir av okkara dugnaligastu tónleikarum verða við. Talan er um Kim Hansen, Eyðun Hansen, Tróndur Enni, Henning Hjalt Nicodemussen, Angelika Nielsen og Tóri Restorff.

Lív Næs verður gestasolistur á konsertunum. Vit kenna hennara natúrligu og sjarmerandi rødd frá útgávuni við Niels Midjord "Tú Skalt Eiga Morgindagin" har hon sang seg inn í hjørtini á flestu føroyingum.

Konsertirnar vera í Mentanarhúsinum í Fuglafirði 29. Des. Á Seglloftinum á Tvøroyri 30. Des. og í Norðurlandahúsinum 13. Jan. Konsertirnar byrja kl. 19.30.

## LUFTTRÝSTIÐ







## Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Illulisat | -4 | Lerwick | 6 | Moskva | -18 | Athen | 15 | Miami | 26 |
| Nuuk | -2 | Aberdeen | -- | Berlin | -1 | Malta | 14 | Los Angeles | 18 |
| Qaqortoq | -4 | London | 0 | Warzawa | -5 | Tunis | 13 | Meksikobýur | 15 |
| Ammassalik | 1 | Tromsø | -- | Kiev | -14 | Beijing | -3 | Panama | 32 |
| Saint John's | -- | Bergen | 0 | Bukarest | -4 | New Dehli | 21 | La Paz | 13 |
| Halifax | - | Oslo | -- | Paris | 1 | Bangkok | 34 | Rio de Janeiro | -- |
| Reykjavík | 5 | Stokkhólm | -2 | Madrid | 0 | Jakarta | -- | Buenos Aires | 22 |
| Seyðisfjørður | 6 | Keypmannah. | 1 | Róm | 8 | Sydney | -- | | |
| Tórshavn | 5 | Helsinki | -13 | Malorca | 10 | New York | 2 | | |

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 16/12 kl. 06[00] – 17/12 06[00]. Hitin í gjár: 5,0°
Minsti hiti máldur í desember: -10,5° -
Mesti hiti máldur í desember: +13,7°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 30/11 kl. 06[00] – 1/12 06[00].
Avfallið higartil í desember: 0 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 16. desember | Tendring |
| 20. desember | Mánin longst frá jørðini |
| 24. desember | Fyrra kvarter |
| 31. desember | Fullmáni |
| 1. januar | Mánin næstur jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 29. des | 03:55 | 16:22 | 02:55 | 15:22 | 03:10 | 15:37 | 05:55 | 18:22 | 06:55 | 19:22 | 02:10 | 14:37 | 01:10 | 13:37 | 04:10 | 16:37 | 05:10 | 17:37 | 03:40 | 16:07 | 04:55 | 17:22 |
| 30. des | 04:50 | 17:19 | 03:50 | 16:19 | 04:05 | 16:34 | 06:50 | 19:19 | 07:50 | 20:19 | 03:05 | 15:34 | 02:05 | 14:34 | 05:05 | 17:34 | 06:05 | 18:34 | 04:35 | 17:04 | 05:50 | 18:19 |
| 31. des | 05:48 | 18:17 | 04:48 | 17:17 | 05:03 | 17:32 | 07:48 | 20:17 | 08:48 | 21:17 | 04:03 | 16:32 | 03:03 | 15:32 | 06:03 | 18:32 | 07:03 | 19:32 | 05:33 | 18:02 | 06:48 | 19:17 |
| 1. jan | 06:41 | 19:10 | 05:41 | 18:10 | 05:56 | 18:25 | 08:41 | 21:10 | 09:41 | 22:10 | 04:56 | 17:25 | 03:56 | 16:25 | 06:56 | 19:25 | 07:56 | 20:25 | 06:26 | 18:55 | 07:41 | 20:10 |
| 2. jan | 07:40 | 20:08 | 06:40 | 19:08 | 06:55 | 19:23 | 09:40 | 22:08 | 10:40 | 23:08 | 05:55 | 18:23 | 04:55 | 17:23 | 07:55 | 20:23 | 08:55 | 21:23 | 07:25 | 19:53 | 08:40 | 21:08 |